# Pedagogfelagið vil samráðast sum skjótast

**Føroya Pedagogfelag hevur tikið niðurstøðu løgmans til eftirtektar, nú hann hevur staðfest, at Helena Dam á Neystabø gav rangar upplýsingar viðvíkjandi samráðingarrættinum í dagstovnalógini. Pedagogfelagið fer í næstum undir samráðingar við kommunurnar,og pedagogarnir fara aftur til arbeiðis fríggjamorgunin**

AVBLÁST VERKFALL
*Stefan í Skorini*

Tað vóru upplýsingarnar frá Helenu Dam á Neystabø, pedagogfelagið bygdi síni sjónarmið á. Nú hevur løgmaður á fundi við Føroya Pedagogfelag mikudagin staðfest, at hesar upplýsingarnar, ið pedagogfelagið fekk, ikki eru rættar.

Hesa niðurstøðu tekur Føroya Pedagogfelag til eftirtektar, nú tey hava fingið staðfest, at teirra útgangsstøði byggir á skeiv boð, tey hava fingið frá táverandi landsstýrismanni í almanna- og heilsumálum.

Løgmaður sigur, at hetta ikki fær nakrar avleiðingar fyri fyrrverandi landsstýriskvinnuna tí løgfrøðingar hjá landinum meta ikki, at nøkur orsøk er til tess.

– Hóast undanfarni landsstýrismaður í almannamálum hevur mistikið seg í hesum spurningi, metir løgmaður ikki, at tað á nakran hátt er løgfrøðiligt grundarlag fyri at gera ábyrgd galdandi móti landsstýrismanni, sigur Anfinn Kallsberg í skrivi til Føroya Pedagogfelag tann 22. mars, og tað sjónarmiðið stendur við.

### Fingu mótsigandi boð

– Felagið hevur bygt síni sjónarmið á hesi úttalilsir frá fyrrverandi landsstýriskvinnu. Tá vit nú hava fingið staðfest frá løgmanni, at landsstýriskvinnan hevur mistikið seg, tekur felagið til eftirtektar, at tað eru kommunurnar, sum hava samráðingarrættin fyri dagstovnaøkið, sigur Føroya Pedagogfelag í tíðindaskrivi.

Tað er til at undrast á, hví Pedagogfelagið ikki tók boðini frá løgmanni til eftirtektar beinanvegin, tá hann boðaði frá, áðrenn verkfallið varð lýst, at tað vóru kommunurnar, ið hava samráðingarrættin.

– Trupulleikin hjá okkum er, at vit hava fingið tvey ymisk og mótsigandi boð úr tveimum ymiskum stýrum í landsins umsiting. Vit hava tí ikki fyrr enn nú fingið eina nóg greiða løgfrøðisliga grundgeving fyri, hví vit skulu taka tað eina framum hitt. Nú hevur løgmaður so staðfest, at tey boðini, vit hildu okkum til, eru skeiv, og tað hevur hann ikki gjørt fyrr, sigur Carita Bjørklund.



*Carita Bjørklund, formaður í Føroya Pedagogfelagi, sigur, at felagið vil sleppa í samráðingar beinanvegin. Hinvegin vísir hon á, at felagið fýlist á málsviðgerðin, hetta málið hevur fingið í landsstýrinum*

Carita sigur seg harmast um, at tað var neyðugt hjá felagnum at fara í verkfall, men hon leggur samstundis dent á, at tað var alneyðugt hjá teimum at fáa greitt fløkjuna, ið tók seg upp.

– Vit meta tað framvegis vera átaluvert, at landsins myndugleikar seta í gildi lóggávu, uttan at teir sjálvir hava greiðu á einum so týðandi spurningi, sum hvør hevur samráðingarrættin á dagstovnaøkinum, sigur Pedagogfelagið.

### Fyrireika seg til samráðingar

Tað eru nú næstan tveir mánaðir síðani, at felagið lat Fíggjarmálastýrinum síni sáttmálakrøv. Hesi krøvini skulu nú sendast kommununum, og Carita Bjørklund sigur, at felagið vil sleppa at samráðast sum skjótast við kommunurnar, tí í løtuni er sáttmálaloysi, og tað kann felagið ikki liva við.

Lønarkrøvini hjá Pedagogfelagnum eru nøkur av teimum somu sum hini sekstan fakfeløgini eisini hava sett fram.

Tað er styttri arbeiðsvika og longri summarfrítíð. Harafturat krevur felagið, at leiðaralønirnar hækka samsvarandi við ta ábyrgd, ið leiðararnir hava. Tann lønarstigi, ið verður nýttur í løtuni, endar ov skjótt, halda pedagogarnir. Møguleiki skal vera fyri at fara upp í løn í eitt longri tíðarskeið enn nú. Eisini skal byrjunarlønin hjá hjálparfólki hækkast, so at tað lægsta stigið verður tikið burtur.

Carita Bjørklund heldur, at enn eru fleiri leysir endar í hesum málinum, hóast eingin ivi longur er um samráðingarrættin.

Kommunurnar í Føroyum eru ikki savnaðar í eitt kommunalt arbeiðsgevarafelag. Av teimum 48 kommununum hava bara 32 boðið pedagogfelagnum til samráðingar. Hvussu verður við hinum sekstan er enn ógreitt, men væntandi fara tær við í samráðingarnar. Pedagogfelagið krevur, at ein sáttmáli verður gjørdur fyri allar pedagogar.

Eitt annað er, at runt um landið eru fleiri sjálvsognarstovnar, ið hava egið stýri. Carita sigur seg hava hoyrt, at kommunurnar kunnu samráðast vegna hesar stovnar, men tað kann hon ikki siga við vissu.

Anna Larsen, virkandi formaður í Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelagi, sigur, at endamálið er at fáa allar kommunurnar við í eitt felag, so at tær kunnu samráðast saman. Hinvegin sær hon onga forðing í, at kommunur, ið ikki hava verið við til at samráða seg til ein sáttmála, nýta henda nýggja sáttmálan hóast alt.

Hóast tað nú er greitt, at pedagogarnir skulu samráðast við kommunur í sambandi við dagstovnar, so skal felagið eisini samráðast við Fíggjarmálastýrið viðvíkjandi serstovnunum, ið enn eru undir landinum.

---

Løgmaður ásannar:

# Málsviðgerðin ikki nøktandi

**Hóast løgmaður hevði boðað frá, at hann ikki fór at taka nakað stig til at finna eina loysn á málinum, so boðaði hann til fundar í Tinganesi mikudagin seinnapart. Fløkjan varð greidd á hesum fundinum, men løgmaður ásannar, at málsviðgerðin ikki hevur verið nøktandi, tá slík ivamál stinga seg upp**

AVBLÁST VERKFALL
*Stefan í Skorini*

– Orsøkin til at eg tók stig til fund við pedagogarnar var hon, at vit kundu fáa greiðu á nøkrum ivamálum og misskiljingum, sum eftir øllum at døma høvdu tikið seg upp, sigur løgmaður, ið fegnast um, at verkfallið er avblást.

Anfinn Kallsberg sigur, at hann ikki beinleiðis hevur funnið eina semju, men at hann heldur hevur greitt nakrar misskiljingar í málinum.

– Um nøkur misskiljing hevur verið, so skuldi hon verið ruddað burtur nú, heldur løgmaður.

### Vánalig málsviðgerð

Løgmaður ásannar, at málsviðgerðin ikki hevur verið nøktandi, tá ein slík misskiljing endar við einum verkfalli.

– Tá nakað kann misskiljast undir eini málsviðgerð, so skuldi hon sjálvandi verið betri. Tað má vera okkara aðalmál, at einki kemur skeivt fyri undir nakrari viðgerð. Tað er altíð keðiligt, tá eitt felag fær nakað at vita frá einum landsstýrismanni, og so er tað ikki tað, sum hendir. Tað er ongantíð nøktandi, sigur løgmaður.

Løgmaður vísir tó á, at Helena Dam á Neystabø greiddi frá í tinginum mikudagin, at hon metti, at Fíggjarmálastýrið átti at taka sær av hesum málinum, so leingi sum eingin annar samráðingarpartur var tilreiðar. Harvið hevði hon ikki sligið fast, at tað var Fíggjarmálastýrið, ið hevði samráðingarrættin. Løgmaður heldur, at stórur munur er á hesum báðum.

*Løgmaður ásannar, at málsviðgerðin ikki hevur verið nøktandi í hesum málinum. Hann sigur eisini, at tað er upp til kommunurnar at avgera, hvussu tær nýta sín samráðingarrætt*



– Eg havi sagt fyrr, at tað eru kommunurnar, ið sjálvar avgera, hvussu tær brúka sín samráðingarrætt. Í prinsippinum er tað hvør einstøk kommuna, sum hevur heimildina av samráðast, sigur Anfinn Kallsberg.



# Dagur Norðurlanda



*Helsingfors-sáttmálin verður undirskrivaður hin 23. mars 1962. Frá vinstru síggjast Viggo Kampmann, Bjarni Benediktsson, Martti Miettunen, Helge Sivertsen og Herman Kling*

*Svenski rithøvundurin Eyvind Johnson fær fyrstu bókmentavirðisløn frá Norðurlandaráðnum hin 23. mars 1962. Tað er finski forsetin Karl-August Fagerholm, sum handar virðislønina*



ÁLMANAKKIN
*Birgir Kruse*

Í dag er dagur norðurlanda, Nordens Dag, tey rópa. Tað var henda dag í 1962, at Helsingfors-sáttmálin varð undirskrivaður á Norðurlandaráðsfundi í finska høvuðsstaðnum.

Henda síðsta dagin á tíggjunda ársfundi Norðurlandaráðsins, varð stóra norðurlendska bókmentavirðislønin, Nordisk Råds Litteraturpris, fyri fyrstu ferð latin. Tað var svenski rithøvundurin Eyvind Johnson, sum fekk hana.

Helsingfors-sáttmálin er alment samstarvsskjal millum Norðurlond og av mongum mett sum fyrsti hornasteinurin í almennum norðurlendskum samstarvi. Stundum verður sáttmálin nevndur stjórnarskrá Norðurlandaráðsins. Við sáttmálanum gjørdist norðurlendska samstarvið formligari og markvísari. Sáttmálin, sum varð undirskrivaður 23. mars, tók við hin 1. juli 1962.

Finnlendingar hava verið ídnir at halda mangar merkis- og flaggdagar, sum eitt nú Nordens Dag. Men í hinum Norðanlondum er lítil áhugi fyri tílíkum staðfestingum.

Norðurlendska samstarvið er skipað á tveimum rásum, teirri almennu og teirri fólksligu. Hin føroyska fólksliga greinin, Norrøna Felagið, hevur fimti ár á baki í november. Tá veturin fer at halla og vit skrivað 2002, røkkur almenna Norðurlandaráðið sama aldur.

---

# Fimm nýggjar barnabøkur

### Tveir lítlir reyðir bilar

“Lítli reyði bilur spælir taxa” og “Lítli reyði bilur kemur illa fyri”, eru heitini á tveimun nýggjum bókum um tann lítla reyða bilin. Í fjør heyst komu tær báðar fyrstu bøkurnar um reyða bilin út: Lítli reyði bilur í kavanum og Lítli reyði bilur er fyri óhappi.

Hesuferð sleppur hann fyrst at royna seg sum taksabilur, og í hinari bókini er hann atvoldin til ferðsluruðuleika.

Bøkurnar eru innbundnar og í litum. Á hvørjari síðu er okkurt at hála í, ella at lata upp. Bøkurnar um lítla reyða bilin kosta 49 krónur í bókabúðunum, og fáast eisini á teldufløgu.

Niels J. Thomsen týddi bøkurnar, og Spf Hestprent stóð fyri prentgerðini.

### Busta tenn, Bersi!

Vanligt er at fortelja børnum um Karius og Baktus, tá ið tey ikki tíma at busta tenn. Nú kemur so ein bók aftrat, sum skal eggja børnum at busta tenn. “Busta tenn, Bersi” er einfaldari, og er ætlað smærri børnum. Bókin snýr seg um bjørnina Bersi, ið ikki tímir at busta tenn. Hann ynskir at hann ikki hevði nakrar tenn at busta, og sera óvænta gongur ynskið út. Í byrjanini er Bersi ovurfegin, men sum frálíður er ikki so stuttligt at vera tannleysur, álíkavæl.

Bókin er 28 síður í litum og innbundin. Hon kostar 90 krónur í bókabúðunum.

Eyðna Magnussen týddi, og Spf Hestprent stóð fyri prentingini.

### Mamma

Mamman er ikki bara tjúkk. Hon er tjúkk sum ein hvalur. Drongurin hevur skomm av mammu síni, og ger av at flyta inn til grannakonuna, sum er kløn og vøkur. Men tað gongur ikki so væl. Drongurin klárar ikki at siga mamma við konuna. Tá ið kvøldið líður flytir hann heim aftur til Mammu.

“Mamma” er ein innilig søga sum vísir, at hóast mamman ikki altíð er sum tú kundi hugsa tær, so er hon álíkavæl allarbest. Mette-Kristine Bak fekk “Kulturministeriets illustratorpris” í 1999 fyri tekningarnar í bókini. Hon er 24 síður í litum, innbundin og kostar 90 krónur í bókabúðunum. Sjúrður Gullbein týddi, og Spf Hestprent stóð fyri prentingini.

### Tsatsiki og mamman

Tsatsiki hevur eina óvanliga mammu, og ein pápa í Grikkalandi, sum hann ongantíð hevur hitt. Og hóast at tað er rokaligt heima hjá Tsatsiki og teimum, so leggja hvørki Tsatsiki ella mamman nakað petti í tað. Tey hava hvønn annan.

Tsatsiki fer í skúla, og har hittir hann sín besta vin í verðini. Eisini verður hann góður við eina gentu, og hvørja ferð hon hyggur at honum so fær hann fepur í búkin!

“Tsatsiki og mamman” er fyrsta bókin í røðini av fýra. Tær eru týddar til nógv ymiski mál, og rithøvundurin hevur vunnið nógvar virðislønir fyri tær.

Bókin er 150 síður við myndum, og kostar 120 krónur. Bergur Rasmussen týddi, og Spf Hestprent stóð fyri prentingini.

